**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 2004.**
**Tíðarskeið: 18/2-4/3 - 2020**

**Fólk við frá Havstovuni:** Jens Arni Thomassen, Mourits Mohr Joensen, Marit Pedersen og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund.

**Endamál:** Hetta var fyrri túrurin av yvirlitstrolingunum á vári í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa.

**Aðrar uppgávur:** Skráseta frástøðu millum trollemmar og eisini millum trolvengur við Marport sensorum. Eisini varð hæddin á høvuðlínuni skrásett. Tikið fjarðaklipp av toski til DNA-kanningar. Tikið nebbasild í land.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m. Marport sensorar. Miniloggarar at máta temperatur.

**Um túrin:** Vegna veður fóru vit ikki út fyrr enn leygarmorgunin 22. februar kl. 7:10. Byrjaðu eystan fyri Svínoy og tóku støðir við land eystanfyri vegna nógvan vind. Fóru longur útfrá og gjørdu økið til Fugloyartunguna liðugt. Komu inn á Havnina at landa hósmorgunin 27. februar og fóru útaftur seinnapartin at taka støðir. Tóku støðir á Suðuroyabanka. Vegna veður máttu vit leggja okkum vestan fyri Sandoy at liggja bakk. Fóru síðan vestan fyri Suðuroy at royna, tó ikki punt 15 vestan fyri Sandoy, sum vanliga verður tikin á seinna túrinum. Vit máttu aftur liggja bakk vestan fyri Suðuroy og fingu tó roynt týsdagin 3. mars uttan trupulleikar. Vit komu inn á Havnina týskvøldið 3. mars kl. 22:30 og landaðu mikumorgunin. Veðrið var ringt meginpartin av túrinum og trý døgn lógu vit bakk. Tilsamans vóru 46 hál tikin, harav 45 góðkend. Tíverri mistu vit innmatin á Marport troleyganum. Eftir at vit settu Furuno troleygað á trolið, vísti tað seg, at tað órógvaði skrásetingarnar hjá Marport sensorunum, tí teir sendu á sama frekvensi. Hetta kom tó í lag aftur seinasta dagin. Longdar-mátibrettið virkaði illa fyrra part av túrinum.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 3. mars. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 12. apríl.

**Fyribilsúrslit:** Tað var minni at fáa av toski og upsa í mun til í fjør. Ein fullfíggjað samanbering við onnur ár fæst við at hyggja at túrfrágreiðingini fyri túr 2006, har úrslitini fyri øll hálini á føroyska landgrunninum eru víst. Sum nakað óvanligt fingu vit nakrar lodnur. Magakanningarnar vístu, at sera lítið var til av nebbasild og at fiskurin át lítið av krabbadýrum og hvítingsbróðri. Toskur og hýsa vóru rak í mun til onnur ár. Vit fingu tveir merktar toskar.

**Talva 1.** Veiða, og nytrur og magar tikin á túri 2004, fyrra helvt av yvirlitstrolingini á føroyska landgruninum í mars 2020.

| FISKASLAG | KG í 45 støðum | Nytrur | Magar | KG í 55 støðum í 2019 | Lutfall KG per støð |
|---|---|---|---|---|---|
| HÝSA | 29993,203 | 480 | 165 | 31545,752 | 1,16 |
| UPSI | 3327,270 | 427 | 107 | 21101,242 | 0,19 |
| HVÍTINGUR | 3290,221 | 20 | 8 | 2862,839 | 1,40 |
| TOSKUR | 2889,128 | 428 | 149 | 10957,570 | 0,32 |
| LONGA | 1259,100 | 123 | 7 | 1235,710 | 1,25 |
| HVÍTINGSBRÓDIR | 980,154 | | | 2460,365 | 0,49 |
| GULLAKSUR | 805,215 | 19 | 18 | 1953,526 | 0,50 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 560,632 | | | 1851,815 | 0,37 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 403,924 | | | 761,687 | 0,65 |
| REYDSPRØKA | 300,328 | | | 584,588 | 0,63 |
| TUNGA | 243,093 | | | 525,880 | 0,56 |
| SVARTKJAFTUR | 233,141 | | | 752,879 | 0,38 |
| HAVMÚS | 203,546 | | | 220,495 | 1,13 |
| BLÁLONGA | 156,151 | 35 | 6 | 103,813 | 1,84 |
| BROSMA | 96,517 | 53 | 1 | 45,174 | 2,61 |
| SKRAMBUL | 83,804 | | | 1,245 | 82,27 |
| HAVTASKA | 78,170 | 9 | 9 | 87,435 | 1,09 |
| KNURRHANI | 76,224 | | | 104,803 | 0,89 |
| ROGNKELSI | 52,685 | | | 100,405 | 0,64 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 39,154 | | | 79,917 | 0,60 |
| LÝRUR | 36,375 | 4 | 2 | 901,452 | 0,05 |
| ECHINIDAE(IGULKER) | 26,136 | | | 11,606 | 2,75 |
| HVASSASPREK | 21,672 | | | 10,109 | 2,62 |
| BÚKSVARTI HÁVUR | 17,949 | | | 67,397 | 0,33 |
| HALAHVASSA SKØTA | 17,450 | | | 0,000 | |
| ASTERIIDAE(KROSSFISKUR) | 15,151 | | | 0,000 | |
| JÁKUPSSKEL | 13,797 | | | 0,544 | 31,00 |
| LÁLLA | 13,531 | | | 34,285 | 0,48 |
| LÍTLABROSMA | 12,340 | | | 12,383 | 1,22 |
| GEODIA SP (OSTUR) | 11,700 | | | 0,000 | |
| HVÍTASKØTA | 11,200 | | | 13,415 | 1,02 |
| STEINBÍTUR | 10,595 | | | 3,060 | 4,23 |
| TINDASKØTA | 10,178 | | | 20,814 | 0,60 |
| KALVI | 8,650 | | | 6,900 | 1,53 |
| LIRI | 8,575 | | | 0,000 | |
| MAKRELUR | 8,537 | | | 0,394 | 26,48 |
| LOLIGO | 5,042 | | | 7,278 | 0,85 |
| ØDA | 2,763 | | | 0,000 | |
| GLÝSUFISKUR | 2,452 | | | 3,207 | 0,93 |
| KRUTT-ULKA | 2,362 | | | 0,000 | |
| SANDSPRØKA (LL) | 1,780 | | | 151,983 | 0,01 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 0,755 | | | 0,000 | |
| SILD | 0,689 | | | 3,330 | 0,25 |
| GÁGGA | 0,400 | | | 0,000 | |
| HUMMARI | 0,234 | | | 0,126 | 2,27 |
| SILVURMURTUR | 0,216 | | | 1,370 | 0,19 |
| BLÁRIDDARI | 0,127 | | | 0,000 | |
| SOLASTERIIDAE | 0,106 | | | 0,000 | |
| SUGÁLUR | 0,040 | | | 0,000 | |
| LODNA | 0,010 | | | 0,069 | 0,18 |
| TILSAMANS | 45332,472 | 1598 | 472 | | |

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í Tur2004d.doc.

Petur Steingrund